



- Eg visti at okkurt fór at skje, sigur royndi arbeiðsformaðurin hjá Fiskavirking í Miðvági



Kári á Preststøðni hevur ikki bert áhuga í fiski. Seyður hevur eisini hansara stóra áhuga

*»Tá ein lýsir eftir eini 15-20 arbeiðsfólkum hjá ALS, og ikki ein einasti søkir, tá er okkurt galið«*

leiðsluni.

Arbeiðið hevur verið rættiliga støðugt á virkinum, og fyri Kára hevði tað sín týdning at fáa eina fasta inntøku at forsyrgja sær og stóru familju síni.

Men tíðir broytast og tað gjørdi fiskivinnan eisini. Hesi seinastu árini hava verið rættiliga turbulent hjá Føroya Fiskavirking. Hetta hevur sum vera man eisini havt sína ávirkan á virkið og virksemið á flakavirkinum í Miðvági.

- Ja, tað er púra vist, at tað hevur ikki verið so øgiliga áhugavert at arbeiða her í seinastuni. Vit hava ikki vitað, hvar vit hava flotið og tað er í heilum at tíðindini hava gingið um at okkara virki skuldi lata aftur.

- Tað hevur verið serliga turbulent tvey tey seinastu árini. Vit vistu bara at okkurt skuldi skje, annaðhvørt her ella í Vestmanna. Og tí koma tað kanska ikki so óvart á meg og okkum, at tað varð okkara virki sum lat aftur, sigur Kári sorgtungur á málinum.

### Einki fólk

Fyri ein so royndan flakamann sum Kára var lítil ivi um, at Fiskavirking kundi ikki halda á við arbeiðinum í Miðvági.

Hesa minniligu viku 23 í 2008 hevði lítið verið av arbeiði á virkinum. Mánaðin framman-undan hevði bert verið arbeiði í 1-2 dagar um vikuna.

Samstundis sum tað var sera trupult at virka nakran fisk, var so at siga ógjørligt at fáa fólk til arbeiðis, helst tí at tey ynsktu sær ein aðra og meiri fasta inntøku.

- Tú skilir, at tá ein lýsir eftir eini 15-20 arbeiðsfólkum hjá ALS, og ikki ein einasti søkir, tá er okkurt galið.

- Hetta var enn eitt tekin um, at trupult fór at vera at halda hesum virkinum upplatið í langa tíð aftrat, greiðir Kári frá.

Á fundinum kl. 14 henda dagin í juni greiddi Meinhard Jacobsen í stuttum frá avgerðini í leiðsluni. Fólk sótu sum negld og eingin teirra megnaði at seta honum ein einasta spurning.

- Fólk vóru sjálvandi kedd um hesa avgerðina fyri arbeiðs-pláss teirra. Tey fóru stillisliga av fundinum og til hús, tí arbeiðsformaðurin hevði avgjørt at einki arbeiði skuldi vera restina av degnum.

*»Tað er harmiligt, tá arbeiðsplássið sum hevur verið mítt síðani eg var 18 ára gamal, má lata aftur«*

### Matur skal á borðið

Eftir meiri enn 32 ár á sama staði, er tað altíð við einum ávísum sorgblídni at ein fer fyri seinastu ferð til hús frá arbeiðs-plássi sínum.

Hann hevur roknað seg fram til at hava arbeitt á virkinum einar 2000 tímar um árið, og faldar ein tað við 32,5 árum, kemur ein til eitt so høgt tímatal sum 65.000.

Kári hevur sum ein av for-monnunum á virkinum eina uppsagnartíð í seks mánaðir, men hevur eins og øll hini fingið boðið arbeiði á virkinum í Vestmanna.

- Eg havi ikki tikið avgerð um, hvat eg skal gera enn, men tað er hjá mær sum hjá øllum hinum: Matur skal á borðið hvønn einasta dag, og haraftrat er alt vorðið so ótrúliga dýrt.

- Tá ein er í slíkari støðu sum eg, so hugsar ein sera nógv. Ein verður ávirkaður av tí og hetta skapar stress hjá mær, tí ein hugsar so nógv um tað fíggjarliga og hvussu gangast skal familjuni í framtíðini.